Helena Dam á Neystabø:

# Nú er ein onnur støða



*Helena Dam á Neystabø er fegin um, at ein stigvís sjálvstýristilgongd eftir øllum at døma verður leisturin í framtíðini. Sjálv hevur hon tó ikki tikið støðu til, hvar hennara politiska framtíð verður, men ein avgerð liggur ikki langt frammi í tíðini.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**– Eg eri ógvuliga glað fyri, at danir melda soleiðis út. Tað, sum mann kann harmast um, er, at ein tílík felags útmelding av hesum slag ikki kom longu í 1998, sigur Helena Dam á Neystabø**

VITJAN
*Heri á Rógvi*

Helena Dam á Neystabø er flestum kunnugt uttanflokka á tingi í løtuni. Hon hevur tó staðið í fremstu røð í fullveldistilgongdini síðani 1998 sum forkvinna í Sjálvstýrisflokkinum og landsstýrismaður.

Hon er tó bæði givin sum landsstýrismaður og sum forkvinnan í Sjálvstýrisflokkinum, men hon hevur boðað frá, at hon stuðlar politikkinum hjá samgonguni.

Sjálv var Helena Dam á Neystabø við á fundinum millum Løgtingið og forsætisráðharran mánadagin.

– Fundurin var góður. Eg haldi eisini, at tað sømir seg væl, at danski forsætisráðharrin hevur fund við Løgtingið, sigur Helena Dam á Neystabø.

### Partur av tilgongdini

Sjálv kennir Helena seg um ein part av sjálvstýrisuppskotinum og sjálvstýristilgongdini.

– Mín egni leiklutur hevur verið at lagt lunnar undir eina semja. Tað hevur eisini altíð verið mítt ynski, at ein breið semja varð funnin í Føroyum. Eg eri ógvuliga glað fyri, at danir melda soleiðis út. Tað, sum mann kann harmast um, er, at ein tílík felags útmelding av hesum slag ikki kom longu í 1998, sigur Helena Dam á Neystabø.

Ein stigvís gongd móti føroyskum sjálvstýri hevur altíð verið tað mest ynskiliga, og tað, sum Løgmaður og forsætisráðharrin hava sagt nú, metir Helena Dam á Neystabø eisini sum gleðiligt. Hon kallar tað fyri ein sigur fyri tey, ið hava virkað fyri føroyskum sjálvstýri.

–Tað er nú fullkomiliga upp til okkum sjálvi at avgera, hvussu og hvat vit nú gera. Ein danskur forsætisráðharri vil sjálvsagt altíð gera sítt til, at ríkið verður varðveitt, men tað týdningarmesta er, at vit nú sjálvi kunnu avgera. Hetta er ein endalig staðfesting av, hvørja loysn vit fara at gera eftir í sjálvstýrismálinum, sigur Helena Dam á Neystabø.

Nógv varð tosað, áðrenn Anders Fogh Rasmussen kom til Føroya, um at tónin millum Føroyar og Danmark skuldi betrast. Helena heldur fyri, at útgangspunktið er eitt heilt annað nú. Eisini heldur hon klimaið vera vorðið betri, men tingini eru eisini øðrvísi nú enn tey vóru fyri nøkrum árum síðani.

Ikki minst fegnast Helena av teirri orsøk, at tosið um fýra ára skiftistíð ikki er ein møguleiki longur.

### Ikki tikið avgerð

Sjálvstýrisflokkurin og Helena Dam á Neystabø vóru heitir talsmenn fyri at halda fólkaatkvøðu um fullveldistilgongdina, men hendan var av ongum.

30. apríl skulu føroyingar aftur í valhølini, og tá fæst at vita, hvønn føroyski veljarin ynskir at ráða her á landi. Helena Dam á Neystabø er samd í tí, at fólksins dómur verður sagdur tá.

Hon hevur tó ikki gjørt upp við seg sjálva – í øllum førum ikki alment – hvussu hennara politiska yrkisleið fer at síggja út í framtíðini. Hon sigur seg ikki hava tikið støðu til henda spurningin. Heldur ikki vil hon svarað spurninginum, um hon hevur fingið nakra áheitan frá nøkrum politiskum flokki.

Edmund Joensen:

# Eitt tap fyri samgonguna

**– Forsætisráðharrin staðfesti, at føroyingar eiga allan avgerðarrættin. Danska stjórnin staðfesti harumframt, at fullveldisætlanin fullkomiliga er slept, sigur Edmund Joensen, formaður fyri tingbólkin hjá Sambandsflokkinum**

VITJAN
*Heri á Rógvi*

Sambandstingmenn vóru í teirri serstøðu, at teir høvdu tveir fundir við danska forsætisráðharran, Anders Fogh Rasmussen, mánadagin.

Formaðurin fyri tingbólkin hjá Sambandsflokkinum, Edmund Joensen, sum kennir danska forsætisráðharran so mikið væl, at umtalar hann stundum bert sum Anders, var eftir fundin, millum tingmanningina og Anders, væl nøgdur við fundin.

– Hann var púra greiður í sínari talu. Hann staðfesti – her á fundinum eins og aðrastaðni – at føroyingar eiga allan avgerðarrætt, um vit vilja vera í ríkinum ella ikki. Danska stjórnin staðfesti harumframt, at fullveldisætlanin fullkomiliga er slept, sigur Edmund Joensen.

Sjálvur helt Edmund ikki, at henda stjórnin hevði orsøk til at hava ein annan tóna enn undanfarna stjórnin. Stjórnin hevur staðfest, at føroyingar hava lagt fullkomiliga á annan bógv, og Edmund metir, at tað á henda hátt kann hugsast sum ein nýggj byrjan.

*Fyrrverandi løgmaður, Edmund Joensen, fegnist um, at danska stjórnin hevur staðfest tann politikkin, sum Sambandsflokkurin eisini hevur sett út í kortið.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



– Tað, sum vantaði á hesum fundinum var, at onkur í samgonguni reisti seg upp og orsakaði alt tað rumblið, sum teir hava staðið fyri hesi seinastu fýra árini. Hetta má vera eitt øgiligt virðingstap fyri samgonguna, sigur Edmund Joensen.

Fyrrverandi løgmaðurin á Oyri leggur dent á, at hetta uppleggið frá Anders Fogh Rasmussen passar ógvuliga væl saman við tí, ið Sambandsflokkurin hevur borið fram í Nýskipanaruppskotinum, sum Sambandsflokkurin legði fram fyri nøkrum árum síðani.

Heini O. Heinesen:

# Eingin broyting

**– Hóast tað er komin ein nýggjur forsætisráðharri, so er ikki eingin munur í mun til Nyrup. Tað er heldur einki nýtt í felagsfráboðanini, og eg dugi ikki síggja, hví tað skal standa skrivað innanfyri ríkisfelagsskapin, sigur Heini O. Heinesen, formaður fyri tingbólkin hjá Tjóðveldisflokkinum**

VITJAN
*Heri á Rógvi*

– Eg dugi ikki at síggja tær stóru broytingarnar. Støðan er status quo. Mann hevur samtykt eina ætlan í Føroyum, sum koyrir regluligt, men eg haldi ikki, at tann danska støðan yvirfyri føroyingum er broytt, sigur Heini O. Heinesen.

Kunoyartingmaðurin hevði júst verið á fundi saman við hinum 31 tingmonnunum við danska forsætisráðharran, Anders Fogh Rasmussen, tá ið vit hittu hann.

Heini greiðir frá, at teir fingu allir høvi til at spyrja og forsætisráðharrin lurtaði eisini eftir øllum sjónarmiðum.

Sjálvur tók Heini O. spurningin upp viðvíkjandi sjálvsavgerðarrættinum, har hann legði dent á, at høvdu Føroyar valt at loyst frá Danmark, er tað neyðugt at Fólkatingið skal siga gott fyri tí, áðrenn hetta verður veruleiki. Danski forsætisráðharrin skýrdi spurningin fyri ov akademiskan. Sjálvur heldur Heini, at hetta er eitt av teimum økjunum, sum tað enn vantar at fáa greiðu á.

Sum heild sá Heini O. rættiliga lítið nýtt í støðuni nú við Anders Fogh Rasmussen.

– Hann er meira konkretur og møguliga er tónin vorðin betri, men tað er í veruleikanum ikki talan um nakað nýtt. Poul Nyruo royndi eisini at sparka bóltin til føroyingar, soleiðis at vit sjálvir skuldu finna útav, hvussu vit skuldu gera, sigur Heini O. Heinesen.

*Heini O. Heinesen er als ikki glaður fyri, at Løgmaður hevur skrivað undir upp á, at tilgongdin skal skipast innanfyri ríkisfelagsskapin*
*Mynd: Jens Kristian Vang.*



Heldur ikki felagsfráboðanin frá Løgmanni og forsætisráðharranum fall í góða jørð hjá Heina O. Heinesen.

– Tað er heldur einki nýtt í felagsfráboðanini, og eg dugi ikki síggja, hví tað skal standa innanfyri ríkisfelagsskapin. Eg eri ikki serliga glaður fyri, at mann skrivar undir upp á, at tað skal vera innanfyri ríkisfelagsskapsins mørk, sigur Heini O. Heinesen.



Jóannes Eidesgaard um boðskapin frá Fogh:

# Alternativið hjá andstøðuni er loysnin

**– Tað, sum Anders Fogh Rasmussen førir fram, samsvarar ikki heilt við politikkin hjá Sambandsflokkinum, hóast hann eisinin hevur flutt seg. Tað samsvarar als ikki við fullveldisætlanina hjá landsstýrinum, men tað er fult og heilt í tráð við okkara politikk og við tað, sum vit løgdu fram á teimum viðgitnu kaffifundunum við samgonguna í 1999, sigur Jóannes Eidesgaard**



*Jóannes Eidesgaard er sera fegin um greiða boðskapin frá Anders Fogh Rasmussen, sum hann heldur leggur støðið, soleiðis at ein nýggj samgonga eftir valið kann fáa í lag eina nýggja skipan millum Føroyar og Danmark – eina sjálvstýrisskipan innan fyri ríkisfelagsskapin*

VITJAN FOGH
*Eirikur Lindenskov*

– Sjónarmiðini hjá Anders Fogh Rasmussen eru fult í tráð við sjálvstýrispolitikkin hjá Javnaðarflokkinum.

Hetta sigur Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins, sum er sera fegin um, at forsætismálaráðharrin hevur gjørt púra greitt, at sjálvstýrisleisturin, sum Javnaðarflokkurin hevur lagt í uppskotinum um sjálvstýrslóg, uttan trupulleikar kann fáa undirtøku í stjórnini og á fólkatingi.

– Eg gjørdist eisini sera fegin, tá forsætisráðharrin á tíðindafundinum í Tingnesi varð spurdur um ognarrættin til ráðevnini í undirgrundini, sum Tjóðveldisflokkurin hevur sátt so nógvan iva um seinastu tíðina. Anders Fogh Rasmussen gjørdi púra greitt, at undirgrundin hoyrir til ríkisfelagsskapin, men at eingin ivi er um, at tað sum møguliga er í undirgrundini, tað eiga føroyingar, og tað kann eingin taka frá okkum, sigur Jóannes Eidesgaard.

### Fogh og Nyrup líkir

Á Føroyavitjan síni hevur Anders Fogh Rasmussen ikki dult fyri, at hann vil »rætta álitið uppaftur« millum Føroyar og Danmark, og hann tosar um »eina nýggja byrjan«.

Jóannes Eidesgaard heldur, at tað í roynd og veru ikki er nakar munur á fyrrverandi forsætisráðharranum, Poul Nyrup Rasmussen og Anders Fogh Rasmussen.

– Anders Fogh Rasmussen sigur ikki annað enn tað, sum Poul Nyrup Rasmussen hevur sagt, síðani samgongan saðlaði um í fullveldismálinum og fór at arbeiða eftir heimastýrislógini. Anders Fogh Rasmussen er meira kontantur enn Poul Nyrup Rasmussen var, og hann dugir betur at smílast, heldur Jóannes Eidesgaard, sum annars dámar væl framferðarháttin hjá nýggja forsætisráðharranum.

### Løgin fagnaður

Men formaður Javnaðarfloksins undrast á fagnaðin hjá Høgna Hoydal og Anfinn Kallsberg. Hann heldur, at ambitiónsstøðið hjá samgonguni er dalað sera nógv.

– Tað hongur illa saman, tað sum hesir menn nú siga. Hugsa vit um fólkini, sum fóru upp á gólv á Gamla Apoteki í mai 1998, tí nú skuldu Føroyar loysa frá Danmark, so er tað løgi, at hesir somu menn nú eru so ovurfegnir um, at forsætismálaráðharrin lovar teimum at yvirtaka eftir heimastýrislógini.

Jóannes Eidesgaard sigur, at tað er einki nýtt í tí, at vit kunnu yvirtaka mál, sum hvørki standa á lista A ella lista B í heimastýrislógini, tí hetta hava vit gjørt fyrr.

– Hetta eru møguleikar, sum hava staðið opnir í 54 ár, sigur hann.

– Eg veit ikki, hvat Anfinn Kallsberg og Høgni Hoydal halda um veljaran, men eftir mínum tykki halda teir veljararnar fyri tað turra spott, og tað prógvar best yvirlýsingin frá fundinum millum Anders Fogh Rasmusen og løgmann, har tosað verður um »overtagelser af yderligere sagsområder inden for grundloven og rigsenhedens rammer«.

Jóannes Eidesgaard heldur, at fullveldi nú liggur langt frammi í tíðini. Hvussu langt frammi vil hann ikki siga.

### Fogh partur av bankamálinum

Á vitjanini í Føroyum segði Anders Fogh Rasmussen, at største orsøkin til »vánaliga tónalagið« millum Føroyar og Danmark var at finna »i den ulykkelige banksag…«, sum undanfarna stjórnin handfór so illa.

Um hetta sigur Jónnes Eidesgaard, at er fyri so vítt rætt.

– Men vit eiga tó eisini at hava í huga –· fyri at tað søguliga skal vera í lagi – at Anders Fogh Rasmussen ver skattamálaráðharri í stjórnini hjá Schlüther, sum sat við valdi, tá Sjóvinnubankin fór av knóranum, og tá Fíggingargrunnurin og Fiskavirking vórðu »uppfunnin«.

Tí heldur Jóannes Eidesgaard, at tað tykist, sum um hann roynir at turka alla skuldina upp á fyrrverandi stjórnina, og at tað bara er partvíst rætt.

– Eisini er vert at hava í huga orðini, sum Anders Fogh Rasmussen varð nógv kritiseraður fyri, tá hann í mars 1998 sum næstformaður í Venstre segði, at «nu lægger vi låg på banksagen…«. Hesi orð, sum Jóannes Eidesgaard heldur, kanska vóru orsøkin til, at Sambandsflokkurin misti fólkatingsumboðanina í 1998.

### Føroyingar gera sjálvir av

Tá forsætisráðharrin hitti løgingsmenn seinnapartin mánadagin, spurdi Jóannes Eidesgaard hann um sjálvsavgerðarrættin, sum so ofta verður havdur á lofti í tinginum. Serliga tjóðveldismenn føra fram, at hava vit brúkt okkara sjálvsavgerðarrætt einaferð, eitt nú til eina skipan innan fyri ríkisfelagsskapin, so kunnu vit ikki brúka hann einaferð afturat, t. d. til fullveldistøkuna.

– Men hetta sópaði Anders Fogh Rasmussen av borðinum. Hann segði, at tað stendur altíð upp til okkum føroyingar sjálvar at gera av, um vit vilja úr ríkisfelagsskapinum ella ikki, sigur Jóannes Eidesgaard.

### Loysnin er ein sjálvstýrisskipan

Formaður Javnaðarfloksins er sannførdur um, at tann einasta loysnin, sum kann savna næstan allar føroyskar flokkar, er ein nýggj sjálvstýrisskipan. Hann skilir eisini á forsætisráðharranum, at hetta er tað hann leggur upp til.

– Tað, sum hann førir fram, samsvarar ikki heilt við politikkin hjá Sambandsflokkinum, hóast hann eisinin hevur flutt seg. Tað samsvarar als ikki við fullveldisætlina hjá landsstýrinum, men tað er fult og heilt í tráð við okkara politikk og um tað, sum vit løgdu fram á teimum viðgitnu kaffifundunum við samgonguna í 1999, sigur Jóannes Eidesgaard.

– Tjóðveldismenn skiltu ikki boðskapin, tá vit løgdu hann fram, men nú ein danskur forsætisráðharri leggur sama boðskap fram fyri teir – á donskum, nú jubla teir, sigur Jóannes Eidesgaard, sum heldur støðið verða lagt, soleiðis at ein nýggj samgonga eftir valið kann fáa í lag eina nýggja skipan millum Føroyar og Danmark – eina sjálvstýrisskipan innan fyri ríkisfelagsskapin.

HYGG HER
Brúktir bilar til sølu
Mitsubishi Pajero 3H
Citroen ZX 1,4 5h
70.000,-
Ford Escort 1,8D CLX 4H
Nissan Primera 2,0 SGL 4h
115.000,-
Mitsubishi Carisma 1,8 GDI 5H
125.000,-
Mitsubishi Galant 2,0 GTI 5H
Seat Cordoba D Sta. 5H
125.000,-
Citroen Xantia 1,9 TD 5H
Fiat Tipo 5H
Mazda
Citroen ZX stc. 1,9TD 5h
77.000,-
Mitsubishi Lancer 1,6 GLXI 5h
52.000,-
Ford Sierra 2,0i CLX
45.000,-
Toyota Avensis 2,0TD stc. 5h
Mazda 626 2,0 TD STC. 5H
125.000,-
OG FLEIRI AÐRAR BRÚKTAR BILAR SO HYGG INN Á GÓLVIÐ OG FÁ EITT GOTT TILBOÐ
Vælkomin til